# Um ærgistaðir og ærgitoftir

*Eftir Sverra Dahl*

Víða hvar í haga, bjørgum og á fjøllum koma vit fram á ymsar leivdir av virki manna frá farnum tíðum. Summar kenna vit væl, t. d. seyðaból og torvkráir, sum fyri ein part enn verða nýttar, men summar eru okkum so ókunnigar, at einki batar at gita. Mangan hjálpa okkum kortini sagnir og staðanøvn, við frásøgnum um vak(tar)hús og skýli frá sjóræn-araøldum; um skúvsungakráir og lomvigakvíggjar veiðimanna; um oksahús, gimbrahús, seyðakráir, svínatippi, purkugerði, kornkráir, sel, havnir (í merkingini beitilendi), kvíggjar og støðlar.

Hildið verður, at tey fyrr í kvíggjum savnaðu fenaðin um náttina, helst eisini til mjólkingar; at tey ofta mjólkaðu neytum á støðlum, vita vit, men ongan grunaði, at tey onkuntíð høvdu neyt gangandi alt summarið millum fjalla so langt frá húsum, at tey máttu byggja smáttur til neytakonurnar eins og í Noregi *sæter* og Svøríki *fäbodar*, fyrr enn *Christian Matras*, professari, greiðir frá rannsóknum sínum um tey norrønu ærgi-nøvnini.[5-6]

Best er at lata Kristian sjálvan koma til orða:

Merkiligasta neytaorðið í føroyskum — um vit tora at kalla tað so — er ikki til uttan í staðanøvnum. Tað er eitt orð, sum í fornføroyskum hevur itið *ærgi,* og sum í nútíðarmáli hevði verið sagt »argi« fyri norðan og í Suðuroy »ergi«. ... Orðið kom inn úr gæliskum, og varð um ár 900 nýtt av norrønum monnum fyri vestan í teimum londum, teir bygdu, uttan tað at til Íslands kom tað ikki, tað vit vita. Í Føroyum hava vit orðið í nøvnum sum *Argisá, Argisdalur, Argisfossur* og í Suðuroyar-nøvnunum *Ergidalur* og *Ergisá*. . . . Einastaðni í Vesturonglandi finna vit

staðanavnið *Airyholme*, sum æt upprunaliga *at Ærgjum* og soleiðis er sama navn sum okkara *á Argjum*, sum av fyrstu tíð má hava itið *at Ærgjum*, t. e. við *ærgini*.

Vit hava kallað hitt fornføroyska orðið *ærgi*, sum vit bert kenna úr staðanøvnum, neytaorð, og tað er sjálvsagt ikki tikið burtur úr ongum. Í nakað gomlum írskum merkti orðið, sum tað føroyska er komið av, neytastøðil ella neytaflokkur. ... Tað [er] vanligt orð í skotskgæliskum, nú ofta framborið a:ði ella a:ri, og líkt er til, at tað haðani kom inn í norrøn vestanmál. Merkingin er annaðhvørt neytahagi við húsi, ella húsum, hjá neytafólki at vera í um summarið ella bert slík summarsmátta hjá neytafólki. ... Hesar merkingar mugu vit hava í huga, tá ið vit fáast við tey staðanøvnini í Onglandi, í Skotlandi, í Orknoyggjum, Hjaltlandi og Føroyum, sum hava orðið í sær. Í jarðarbókini ensku frá 1080, Domesday Book, sæst, at um tað mundið vóru nógvir vesturenskir garðar, sum itu okkurt við »erg«, tað er okkara »ærgi«. Hetta er líkt tí, sum vit kenna úr Noregi, at garðar koma upp, har sum áður var *sætur*, tað, sum norðmenn rópa »sæter«. Í Føroyum man í flestum førum merkingin hava verið tann sama, sum tann norska orðið »sæter« hevur.[6]

Stórtíðindi, ið, sum vera man, elvdu Fornminnissavninum til skrásetingar og rannsóknar. Fyribils úrslitini verða sýnd í hesi skrá og á kortinum, *1. mynd*.

Tølini framman fyri bygdanøvnini eru tey nummur, bygdirnar hava í teirri staðarskipan, ið Matrikulstovan og Fornminnissavnið nýta. Samanberið tey við Føroyakortið, bls. 363.

11 Sunnbø, 114 Økrum: *Ergibyrgi*; 15 Hovi: *Ergidalur*; 20 Skúvoy: *Argisá*; 24 Dali: *Argisfløttur*; 26 Skálavík: *Argisgró(s)á*; 27 Sandi, 271 Skopun: *Argisfossur*; 28 Sandavági: *Argishamar;* 33 Mykinesi: *Argisbrekka;* 36 Nólsoy: *Áin á Argiskletti*; 37 Kirkjubø, 371 Argjum: *Argjum*; 43 Kvívík: *Argisá*; 44 Vestmanna: *Argisáir*; 57 Selatrað: *Argisgjógv*; 60 Eiði: *Argisá*; 66 Fuglafirði, 661 Hellunum: *Argisá* (*í Havnarbø*); 73 Glyvrum: *Argislíð*; 77 Húsum: *Argastíggjur*; 87 Múla: *Argisdalur* (*Argdalsrætt*).

Hesi *Arg-*, *Argja*-nøvn hava fyrr verið orðleidd til *ørga-*. [3-4]

Yvirlitið er ikki fullfíggjað, ivamál eru ikki tikin við. Kortini sæst, at *ærgi* finnast hjá nøkrum av teimum 7 bygdum, umtalaðar eru í Føroyingasøgu: *Hovi*, *Skúvoy*, *Sandi*, og at onnur eru innan fyri ognarmark bygda, har ið rannsókn


Tórshavn
Ærgi
Ærgi, ávíst toft – Ærgi, identified site
Garðar nevndir í Føroyingasøgu – Farms mentioned in the Saga
Funnir víkingaaldargarðar – Excavated Viking Age Settlements
Ætlaðir víkingaaldargarðar – Indicated Settlements

1. mynd. *fig. 1.*

hevur prógvað, at víkingaaldar bústaður var: *Kvívík* og *Fuglafirði*.

Tess vegna man neyvan vera ov djarvt, longu eftir skrásetingini, at meta, at ærgini hjá okkum eins og fyri sunnan (sí: frágreiðing Matras) hava uppruna sín í víkingaøldini (800—1035). Er hetta beint, tora vit helst eisini at ætla um, at ærgi-nøvn í øðrum bygdum benda á, at har vóru víkingagarðar við, serliga teimum, ið vit eftir navnalagnum frammanundan væntaðu tað: *í Sunnbø* og *í Kirkjubø*.

Yvirhøvur eru ærgini langt frá heimbygdini, t. d. Sunnbø — Ergibyrgi, Sandi — Skopun, Kirkjubø — Argjum, og vóru í líðum og í dølum við grasgóðum, víðum summarbeiti. Tær higartil funnu húsatoftir standa allar við rennandi vatn, sum nógv staðarnøvnini eisini siga frá (sí: skrá og kort).

Ætlanin var at byrja rannsókn á Hellunum, tí at vit vistu um stóra toft við Argisá, har *Símun Jacob Johannesen* hevði funnið og latið savninum: Skifurbrýni, savnnr. 3639. Men tað kom at vera Ergidalur í Hovi, vegna tess at SEV hevði í hyggju at seta dalin undir vatn, og tað ráddi um at bjarga toftunum, áðrenn nakað hendi.*

*Ergidalur* er miðskeiðis á oynni millum vatnið *Vatnsnes* og *Vatnarygg* og o. u. 200 m yvir sjóvarmála. Opin, vakur dalur, betri beitilendi millum fjalla finnst neyvan í oyggjunum. Bøndurnir í Hovi áttu hann allan fyrr, nú er markið millum Hovs og Porkeris áin, ið kemur úr *Bessavatni* og rennur oman av *Ergifossi* í Vatnsnes. Eftir Vatnaryggi liggur mannagøtan, og mangur hevur her haft skund, tí at Vatnaryggur er íbygdur. Frásagnir eru nógvar um huldufólk og kristin, men tær fáa vit ikki við hesa ferð. Sera forvitnisligar eru tær, við at vera eitt av fáu dømunum um, at huldusagnir og veruligir fundir bera saman.

*2. mynd* vísir tann partin av Ergidali, sum eina ferð var

---

* Sjálvbodnir hjálparmenn vóru lærararnir Kári Jespersen, Svenning Tausen og Eyðun Winther, teimum veiti eg mikla tøkk fyri henda dugnað.



2. mynd. Ergidalur í Hovi.
*fig. 2. Ergidalur, Hov in Suðuroy.*

bygdur. Aftast er Ergifossur, vinstru megin ánna sæst grótrúgva, ið man hava verið støðilin, sum nú er samanrapaður, og sum Ergifossur tykist hava lopið oman í við nógvum gróti. Høgrumegin sæst toftin av teimum húsum, har ambætingarfólkini búðu.

Toftin stendur oman og niðan fram við ánni, hagar dyrnar venda. Innan er toftin nú 5,3 m long, 3,5 m breið, tað sýnist tó, sum hon er munin breiðast o. u. miðjuna, men tað er enn óvist, tí at veggirnir eru skilliga signir. Teir eru laðaðir við heldur smáum gróti, hægsti varðveitti veggur er ovari galvur o. u. 0,70 m. Veggurin móti ánni er o. u. 1,50 m tjúkkur ífyll-

ingarveggur. Nú vóru húsini skilað sundur í tvey rúm við tvørveggi eftir miðjuni, tó tað sýnast tey ikki hava verið av fyrstu tíð. Tað man vera gjørt seinri, tí at undir tvørvegginum er farvegur av øskulind, ið helst er ein teirra, vit finna í niðara rúmi, har ið fannst føst gólvskón, í støðum ógviliga hørð, av leirsandi og í minsta lagi av tveimum greiniligum øskulindum oman á yvirhøvur steinsettum gólvi. Tað er óivað steinsett, tí at húsini, tá sum nú, stóðu á vátlendi. Mest øska var vituligt uttan um eldstaðin, ið stendur í samankomingini millum norðara langvegg og fyrr nevnda tvørveggin. Hann er gjørdur av longum, reistum hellum, so til bar at hava botnin á hesi grúgvu, sum hon væl má heita, væl hægri enn gólvið. Øskufláirnar í henni skiftu frá reyðgulum liti til tann fagrasta djúpreyða. Niður við ein av grúgvusteinunum var í øskuni eftir enda sett stórt ílátabrot úr óglaraðum (føroyskum?) leiri, og á gólvinum framman fyri grúgvuna stóð sessur av stabbagróti, sum tey mega hava baksað hagar langa leið.

Fleiri ílátabrot, av sama slagi sum tað í grúgvuni, sløddust ymsar staðir í gólvskónini. Einki annað av týdningi varð funnið.

3. *mynd* er av syðra helmingi toftarinnar; veggurin, sum professarin stendur á, er tann móti ánni. Fremst sæst ovari duravangi og høgrumegin partur av tvørvegginum. Fólkini aftanfyri hyggja at snøggum laðingum, ið har eru móti og á báðum áarbøkkum. Tær fáa neyvan verið annað enn støði undir brúgv, ið skuldi sýnst óneyðug um so mjáa og grunna á sum hesa.

## ÚRTØKA

Húsini sjálv siga okkum einki. Men við tað at leirílátabrotini eru av bollum, ið hava víkingaaldardám, og skrásetingin vísir, at føroysku ærgini av fyrstu tíð hava samband við vissar víkingagarðar, man ikki vera ovboðið at tíðarfesta, í minsta lagi ærgið í Ergidali, til somu øld, sum Matras tíðarfestir ærgini í Bretlandi, t. e. 900 árini. Somu ærgi munna tó



3. mynd. Toftin í Ergidali sæð eystan.
*fig. 3. The shieling in Ergidalur, from east.*

eisini hava verið nýtt langt inn í miðøldina. Rannsóknir á oynni *Mon* sýna, at har er tað, umframt í víkingaøld, gjørt í 1100 og 1200 árunum.[2-1]

Hvørt sum er, ærgini geva okkum glottar inn í menningarsøguna, sum óivað fær tað at lýsa í, víðari enn vit í dag rættiliga hóma.

## SUMMARY

In 1956 Professor Chr. Matras demonstrated the former use of shielings in the Faroes, based on the occurrence of the element *ærgi*, Old Irish *airge* in Faroese place-names[5]. The philological discovery was followed by archaeological recording and excavation, and in this paper identified and still unidentified remains of shielings are surveyed (*fig. 1*) and the excavation of a site in Ergidalur at Hov in Suðuroy is described.

To the left of the brook on *fig. 2* an enclosure for the cattle — still unexcavated — is shown. To the right is the site of the house, *fig. 3.*, from where the brook was crossed by a bridge. The house is 5.3 × 3.5 m inside and is divided by a secondary partition wall. Of dating evidence remains of clay bowls of Viking Age character are mentioned.


## BÓKMENTIR


1. *Foote, P. G.* and *D. M. Wilson:* The Viking Achievement. London, 1970, bls. 148.
2. *Gelling, P. S.:* Medieval Shielings in the Isle of Man. Medieval Archaeology VI—VII, 1962—63, bls. 156—72.
3. *Jakobsen, J.:* Strejflys over færøske Stednavne. Nordisk Tidsskrift for Filologi. 3.R., 17.B., bls. 72.
4. *Matras, Chr.:* Stednavne på de færøske Norðuroyar. Aarbøger for nordisk Oldkyndighed, København 1932, III. række, 22. bind, bls. 312.
5. *Matras, Chr.:* Gammelfærøsk *ærgi,* n., og dermed beslægtede ord. Namn och Bygd XLIV, 1956, bls. 51—67.
6. *Matras, Chr.:* Írsk orð í føroyskum. Álmanakki 1966, Keypmannahavn, bls. 26 f.
7. *Wilson, D. M.,* sí: Foote P. G., nr. 1.